# Kunnu fáa eina til tvær milliónir fyri hvørt skip

**Altjóða skipaskrásetingin í Føroyum kann gerast ein verulig inntøkukelda hjá føroyska landskassanum, men at bara at lækka skattin er ikki svarið, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum**

ALTERNATIV INNTØKA
*Áki Bertholdsen*

– Tað eru avgjørt møguleikar fyri at fáa fleiri útlendsk skip skrásett í føroysku altjóða skipaskrásetingini, FAS.

Tað heldur Óla Hans Hammer Olsen, stjóri á Skipaeftirlitinum, sum verður ein av teimum, ið fara at leggja fram á ráðstevnuni hjá Skipatingi í dag. Sí aðrastaðni í blaðnum.

Fáur hevur kannað altjóða skipaskrásetingar so nógv sum hann, tí hann er júst nú í ferð við eina ritgerð um evnið í sambandi við hægri lestur.

Hann heldur, at tað ber til at fáa eina inntøku uppá millum eina og tvær milliónir av hvørjum útlendskum skipi, sum verður skrásett í FAS.

Eftir FAS- skipanini betalir manningin 35% av inntøkuni í skatti, men 28% av upphæddini fær reiðarin endurgoldið úr landskassanum, sigur Heðin Poulsen á Sjóvinnufyrisitingini, ið eisini fer at leggja fram í dag.

Inntøkan hjá landskassanum er sostatt 7%, men harafturat koma ymisk gjøld, eitt nú skrásetingargjald og onnur gjøld.

Hann sigur, at ymsir mátar eru at fáa inntøku av altjóða skipaskrásetingum.

– Ein máti er at manningin betalir skatt. Ein annar máti er at betala skatt eftir, hvussu nógv tons skipini eru.

– Sostatt veit reiðaríðið altíð, hvussu stórur skatturin er, sama um tað gongst væl ella illa.

Hann væntar, at møguleikar eru fyri at fáa meiri burturúr FAS, men tillagingar krevjast og tað krevst eisini, at reiðarar verða betri kunnaðir um hana, tí kappingin er hørð.

### Lágur skattur er ikki svarið

Óla Hans Hammer Olsen sigur, at skulu vit fáa nakra munandi inntøku av FAS skipanini, má skipanin broytast, tí og í nógvum førum er hon ein forðing.

– Men tað er púra greitt, at tað er ikki bara at lækka skattin og halda, at so koma skipini av sær sjálvum. Men lægri skattur hjálpir sjálvsagt til.

Hann sigur, at nógvar aðrar tillagingar eru neyðugar, eitt nú at lækka ymisk avgjøld.


*Stóra, norska tangaskipið, Bergina er einasta útlendska skip av týdningi, sum er skrásett í føroyslu altjóða skipaskrásetingini. Men tað ber til at fáa fleiri útlendskar reiðarar at skráseta skipini í Føroyum, heldur stjórin á Skipaeftirlitinum*

– Ein máti er at gera eina skipan, har reiðararnir betala skatt eftir tonsatalinum, skipini hava.

– Aðrastaðni kunnu reiðarar velja, antin teir vilja betala skatt av avlopinum, ella um teir vilja betala skatt eftir tonsatalinum og tað eiga vit eisini at umhugsa í Føroyum.

– Hjá teimum stóru, múgvandi feløgunum, loysir tað seg best at betala skatt eftir tonsatalinum, men hjá minni reiðaríðum betair tað seg betri at betala skatt eftir avlopinum.

Óla Hans Hammer Olsen heldur eisini, at FAS lógin má broytast, so at tað kann bera til at gera avtalur við útlendskar sjómenn, uttan at teir skulu noyðast at búgva í Føroyum, ella vera limir í føroyskum fakfelag.

– Tað verður eisini neyðugt at tillaga onnur gjøld, eitt nú skrásetingargjald og stempulavgjald. Er tað rímiligt, at vit fáa 150.000 krónur fyri at seta eitt stempul á eitt pappír, sum ítøkiligt dømi er um, spyr hann.

Og gjøldini til sosialu skipanirnar í Føroyum, eitt nú til Almannstovuna, eiga at vera avtikin. Ístaðin ber tað til at skipanirnar í tryggja manningina á annan hátt.

– Vit eiga eisini at broyta ymisk tekniskt krøv, tí tað kann gerast, uttan á nakran hátt at gera okkum til eitt hentleikaflagg, tí ymisk krøv, sum eru óliðilig, kunnu lækkast, hóast skipini skulu lúka øll kvøv fyri tað.

– Samanumtikið skal skipanin gerast nógv meiri altjóða og nógv meiri kappingarfør, skal tað eydnast at fáa skip hendanvegin, heldur Òla Hans Hammer Olsen.

– Tað er eisini neyðugt at kunna útlendskar reiðarar um skipanina.

Hann vísir á, at landskassin fær góðar tvær milliónir í inntøku av Berginu, men hann veit eisini, at teir eru ikki heilt nøgdir við.

# Skal gerast eitt munandi ískoyti

**Fas Skipanin kann gerast eitt munandi íkast**

ALTERNATIV INNTØKA
*Áki Bertholdsen*

– FAS skipanin skal gerast eitt munandi ískoyti í føroyska búskapinum.

Tað er endamálið, hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni.

Men hann viðgongur, at skal tað eydnast, er tað neyðugt at gera tillagingar.

– Sìðani Bergina kom í flotan er ymisk óheppið komið undan kavi, eitt nú hevur reiðarin fingið útreiðslur, ongin hevði roknað við, eitt nú til ALS og barsilsskipanina.

– Hetta hevur skapt ónøgd og ótryggleika og er drepandi fyri áhugan at skráseta skipini.

Hann heldur, at tí verður neyðugt at laga skipanina greiða, so at vit fáa greiðar skipanir.

– Tað er neyðugt, at vit fáa greiðar skipanir, so at feløg fáa at vita, hvat tað kostar at skráseta skipini í FAS, uttan at stúra fyri óvæntaðum rokningum so við og við.

Han ætlar tí at seta eitt FAS-forum á stovn, har fólk úr ymsum stýrum og myndugleikar undir landinum, sita, so at øll mál og allir spurningar kunnu avgreiðast á einum og sama stað. Hetta forum skal sostatt verða sambindingarlið ímillum føroyskar myndugleikar og reiðaríðini.

Men harumframt er neyðugt at broyta skipanina og laga hana til, so hon verður kappingarfør.

Hann sigur, at somuleiðis er tað neyðugt at kunna feløgini um skipanina.

Hann heldur eisini, at fyrimunir eru í skipanini, eitt nú hava vit lagaligari avskrivingarskipan, vit tað, at vit kunn ubyrja at avskriva beinanvegin, sáttmálin er gjørdur. Somuleiðis er tað ein stórur fyrimunur, at partafelagsskatturin varð lækkaðu niður í 20%.

Hjá okkum er gyltur møguleiki at broyta skipanina, tí vit hava so fá skip í henni, at broyt ingar kosta ikki landinum stórvegis og tað eiga vit at gera, heldur hann.

# Vita um føroyingar kunnu fáa inntøku av útlendskum skipum

**Føroyska altjóða skipaskrásetingin hevur ikki verið tað gullnám, ið mong vónaðu, at hon fór at verða, men nú verður roynt aftur**

ALTERNATIV INNTØKA
*Áki Bertholdsen*

Hvussu kann føroyska, altjóða skipaskrásetingin, vanliga nevnd FAS, gerast eitt ískoyti til føroyska búskapin?

Hetta er evnið á eini almennari ráðstevnu, sum verður á Føroya Sjómansskúla í dag.

Tað er áhugafelagið, Skipating, ið skipar fyri ráðstevnuni, ið verður sett klokkan 10 í morgun og endar umleið klokkan 15.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, fer at seta ráðstevnuna. Tey, sum annars fara at leggja fram, eru

Per Gulklett, føroyskur skipsmeklari í Keypmannahavn, Tórleivur Mikkelsen, umboðsmaður í Føroyum fyri útlendsk reiðarí, Gunnbjørn Joensen, reiðari í Hósvík, Heðin Poulsen á Skipaskrásetingini, Óla Hans Hammer Olsen á Skipaeftirlitinum, Regin Thomsen á Toll- og Skattstovuni og Petra Johnsdóttir Joensen á Almannastovuni.

– Skipating er eitt áhugafelag, sum hevur til endamáls at økja fakligan kunnleikan til sjóvinnuna, sigur Tórleivur Hoydal, skrivari í Skipatingi.

Hann sigur, at evnini, tey taka upp, eru eitt nú trygd, skipatøkni, útbúgving, umhvørvisvernd o.s.fr.

Í Skipatingi er Andras Joensen, leiðari á Norsk Veritas í Føroyum, formaður, Tórleivur Hoydal á skipasýninum er skrivari, og annars sita í nevndini: Kaj P. Mortensen, aðalstjóri í fiskimálastýrinum og Jón Magnussen, lærari á sjómansskulanum, Helgi Hansen, lærari á Maskinskúlanum.


*Tangaskipið, Magn, er eitt av føroysku skipunum í Føroysku, altjóða skipaskrásetingini, FAS. Norrøna, Blikur og Lómur eru trý onnur skip, men FAS hevur ikki fingið ta undirtøku, nógv vónaðu*

Onnur lond, eitt nú Danmark og Noreg hava havt alttjóða skipaskrásetingar, og varð ikki okkurt líknandi tiltak sett í verk í Føroyum eisini, stúrdu myndugleikarnar fyri, at føroyskir reiðarar fóru at seta skipini undir fremmant flagg, fyri at lækka útreiðslurnar, tí tað er nógv bíligari at skráseta skip í altjóða skrásetingini, eitt nú spara reiðarar munandi í skatti og øðrum útreiðslum.

Føroyska altjóða skipaskrásetingin hevur yvir 10 ár á baki og tá settu summi stórar vónir til, at hon fór at gerast ein rættilig inntøkukelda hjá føroyska landskassanum.

Men tað vísti set ikki at halda stikk.

– Útlendsku skipini í hava verið fá. Eitt skifti vóru trý, norsk tangaskip í Fas, men tey fóru úr aftur og vórðu skrásett onkra aðrastaðni. Og nú er bara eitt útlendskt skip av týdningi í Fas, tað er norska tangaskipið, Bergina.

Torleivur Hoydal sigur, at endamálið við ráðstevnuni í dag er at fáa eina stungiðå út í kortið nakrar leiðir at ganga fyri at gera FAS skipanina til eitt ískoyti hjá føroyska búskapinum



# Velja próstadømisráð

**Nýtt próstadømisráð skal veljast innan 1. apríl, hóast ráðið, sum situr, bert hevur sitið hálvt valskeið. Valið, sum nú verður, verður hildið av praktiskum orsøkum**

KIRKJUMÁL
*Edvard Joensen*

Nýtt próstadømisráð skal veljast innan 1. apríl. Valskeiðið er fýra ár, og nýggja ráðið fer at loysa tað sitandi próstadømisráðið av, hóast hetta bert hevur sitið hálvt skeið.

– Tað hevur tó á ongan hátt nakað við trupulleikar av nøkrum slagi at gera, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, sum er formaður í valstýrinum fyri próstadømisráðsvalið. Grundin er tann, at lógin um próstadømisráð sigur, at próstadømisráðið skal vera valt í seinasta lagi 1. apríl árið eftir, at kirkjuráðsval hevur verið. Kirkjuráðsval var í fjør, og tí skal so próstadømisráðið veljast í ár.

Lógin um próstadømisráð í Føroyum kom i gildi á nýggjárinum ár 2000, og varð fyrsta próstadømisráðið tá valt.

Av tí, at hetta var mitt í millum tvey kirkjuráðsval, gjørdist skeiðið hjá hesum fyrsta ráðnum bara hálvt. Nú verður so eftir lógini aftur val, og nýggja ráðið fer so at sita í fýra ár.

–So tað, at val er longu aftur, er bara av praktiskum orsøkum og fyri at fylgja lógini, sigur biskupur.

Próstadømisráðið er í grundini fíggjarnevndin hjá føroysku fólkakirkjuni og verður valt millum kirkjuráðslimir og prestar. Tað sita fýra fólk í próstadømisráðnum.

Tann, sum valdur verður í próstadømisráðið, skal vera limur í fólkakirkjuni, sigur biskupur. Men annars ligur eingin treyt við valbarinum soleiðis. Tað er ikki so, at ráðslimirnir skulu vera kirkjuráðslimir ella kirkjutænarar ella nakað soleiðis.

Áhugin fyri próstadømisráðsvalinum tykist stóru, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur. Tá vit tosaðu við hann í gjár, var kortini bara ein listi innkomin, men hann væntaði, at fleiri fóru at koma, áðrenn freistin at stilla upp er úti í kvøld klokkan 19.00. Fleiri fólk hava víst áhuga fyri valinum og spurt seg fyri um ymiskt.

Biskupur byggir metingar sínar á seinasta valið, sum var. Tá valdu væl oman fyri 90 prosent av teimum, sum valrætt høvdu.

Tað eru 60 kirkuráð í Føroyum, og talið á kirkjuráðslimum liggur oman fyri 400, sigur biskupur. Umframt koma so prestarnir, sum eisini hava valrætt.

Av tí, at bara fýra limir verða valdir, verða tað tey økini, har flestar kirkur eru, sum fáa valdar limir. Tó kunnu listasamgongur gerast, sum á tann hátt kunnu fáa ein lim valdan í próstadømisráðið. Og tað varð eisini gjørt onkunstaðni seinast, sigur biskupur.

Til sjálvt valið sendir valstýrið øllum kirkjuráðunum vallista og annað valtilfar. Tey, sum valrætt hava, fáa so eina ávísa tíðarfreist at velja í, áðrenn listarnir verða sendir aftur. Um tað hendir, at onkur listi ikki verður brúktur, einki val verður, ella hvat nú henda kann, skulu teir óbrúktu listarnir eisini sendast aftur, greiðir biskupur frá.

Talt verður síðan upp sum við eitthvøt annað val, og uppteljingin er almenn.

Prósturin hevur dagliga raksturin hjá ráðnum um hendur. Tað verður gjørt av skrivstovu hansara. Eisini hevur hann rætt at møta á fundum hjá ráðnum, sum ráðgevi. Men hann hevur ikki atkvøðurætt á fundunum. Tað hava bara teir fýra valdu limirnir. Eingin føddur limur eru í próstadømisráðnum.


*Próstadømisráðið verður valt millum kirkjuráðslimir og virkar sum fíggjarnevnd hjá fólkakirkjuni*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Fult høsnahús

**3.800 hønur komu í gjár í nýggja partin av høsnagarðinum hjá Føroya Egg á Velbastað. Skipanin er nú full, og virkið kann rekast optimalt**

LANDBÚNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Velbastað:** Eggvirkið hjá Føroya Egg á Velbastað er nú fult útbygt. Umleið 7.000 hønur eru nú í báðum húsunum á garðinum.

Í gjár komu 3.800 nýggjar hønur úr Danmark til Velbastaðar. Við teimum er skipanin full, sigur eigarin, Anfinn Brekkstein á Velbastað.

Tá virkið byrjaði, var bara eitt hús, og tí varð neyðugt at leggja stilt eitt styttri tíðarskeið, meðan hønurnar vórðu skiftar út.

Nú bygt er uppí, ber til at skifta út loypandi, soleiðis at drift alla tíðina er á virkinum, hóast allar hønurnar í øðrum bygninginum verða skiftar út í senn.

Nýggi bygningurin er eitt sindur øðrvísi bygdur enn tann eldri, sigur Anfinn Brekkstein. Hann er hægri og heldur arbeiðsligari, sigur hann.

Hønurnar fara allar at ganga leysar. Sonevndar skavihønur, sigur eigarin, sum leggur stóran dent á at fáa fram, at talan als ikki er um búrhønur.

Samlaða íløgan, nú bæði húsini eru tikin í brúk, liggur oman fyri hálvafjórðu millión krónur, sigur Anfinn Brekkstein.

Síðan eggvirkið byrjaði, hevur Føroya Egg selt øll eggini til handlar í Tórshavn. Teir stóru sum Miklagarður og Føroya Keypsamtøka hava tikið í móti nógvum, eins og P. E. Kolonial, Hjá Gunleivi, Hjá Eli og Johs. Andreasen hava selt føroysk egg av Velbastað.

Anfinn Brekkstein sigur, at hóast nøgdin nú verður tvífaldað, fer hann fyribils ikki at selja aðrastaðni enn í Havnini kortini.

– Teir kundarnir, vit hava, hava klárað at selt alt, sum vit hava kunnað latið, og høvdu viðhvørt helst eisini kunnað selt meira, um tað var til. So vit fara at leggja okkum eftir at røkja tann marknað vit longu hava, áðrenn vit fara at hugsa um at fara víðari, sigur hann.

Hønurnar, sum komu til Velbastaðar í gjár, skulu nú venja seg við nýggja umhvørvið, og Anfinn Brekkstein væntar, at um einar fjúrtan dagar til tríggjar vikur, eru allar farnar at verpa.


*Flutningurin gekk sera væl, sigur Anfinn Brekkstein, sum í gjár fekk 3.800 sekstan vikur gamlar hønur úr Danmark. Nú eru umleið 7.000 hønur í høsnahúsinum á Velbastað*
*Mynd: Edvard Joensen*